Eftirlitið við loftrúminum í Føroyum

Um føroyingar skulu hava part av tí peningi, sum flogfør gjalda fyri at flúgva yvir føroyskum øki, mugu vit eisini uppbyggja eina loftferðslutænastu, sum lýkur altjóða krøv. Eitt samstarv við íslendingar er helst sannlíkt.

INGI RASMUSSEN

Íslendingar veita flogførum, sum flúgva í loftrúminum á okkara leiðum, ta neyðugu loftferðslutænastuna og hava eftirlitið um hendi. Av tí sama fáa teir eisini inntøkurnar av tænastunum og eftirlitinum.

Fyri nøkrum árum síðani setti landsstýrið sær fyri at kanna, hvørjar møguleikar føroyingar hava at fáa part av tí peningi, sum flogførini gjalda fyri at flúgva yvir føroyskum øki.

Bjarni Djurholm, tingmaður fyri fólkaflokkin, hevur reist spurningin aftur, og hevur sett Sámal Petur í Grund, landsstýrismann, ein fyrispurning um, hvussu gongst við ætlanini.

Sámal Petur í Grund svaraði fyrispurninginum á tingfundi í síðstu viku.

Í viðmerkingunum til fyrispurningin sigur Bjarni Djurholm, at tað flúgva umleið 60.000 flogfør um føroyska loftrúmið árliga. Fyri hetta fáa íslendingar eitt fast gald fyri hvørt flogfarið, sum flýgur í økinum.

Tvinnir møguleikar

Í svarinum sigur Sámal Petur í Grund, at um føroyingar ynskja at yvirtaka tænastuna eru tveir møguleikar.

Antin seta vit eina fullfiggjaða eftirlitstænastu á stovn, ella verða partar av tænastuni yvirtiknir.

Verður fyrra loysnin vald, eru føroyingar noyddir at stovna eina altjóða FIR (Flight Information Region), sum lýkur somu krøvini, sum tann íslendska, nevnd FIR-Reykjavík. Eitt nú skulu ilegur gerast í umfatandi flúgvileiðarar, veðurfrøðiligar skipanir og radaraeftirlit.

Eftir upplýsingunum, sum landastýrið hevur fingið frá danska ferðslumálaráðnum, so arbeiðir altjóða felagsskapurin ICOA - sum skal samtykkja eina stovnan av føroyskari FIR - við at minka um talið av sjálvstøðugum FIR-um, tí at eitt nú tekniliga menningin ger tað møguligt at hava størri økið undir einum eftirliti. Hetta ger tað uppaftur truplari hjá føroyingum at stovna eitt sjálvstøðugt eftirlit.

Samstarv

Landsstýrismaðurin fer tí helst at mæla til, at arbeitt verður móti eini loysn, har føroyingar yvirtaka føroyska loftrúmið innan íslendsku skipanina.

Við hesum væntar landsstýrismaðurin, at krøvini til bygnað, manning og útgerð verða minni.

Ein arbeiðsbólkur hjá landsstýrinum kom longu fyri hálvumfjórða ár síðani við eini niðurstøðu, har bólkurin mælti til at heita á danska ferðslumálaraðharran at arbeiða fyri, at loftferðslutænastur fyri yvirflugvingar gjegnum føroyskt loftrúm skulu gerast í Føroyum.

Hetta kundi verða skipað annaðhvørt soleiðis, at føroyingar yvirtóku alla formliga ábyrgd og leiðslu, ella soleiðis, at føroyingar stóðu fyri tí praktiska arbeiðnum undir íslendskari leiðslu.

Landsstýrismaðurin tykist sostatt hella longur móti tí seinnu loysnini.

Sami bólkurin mælir eisini til, at samráðingar verða tiknar upp við NATO um, at eitt føroyskt felag yvirtekur tekniska rakstur av støðini á Sornfelli.

Sum skilst hava danir onga avgjørda støðu í málinum, men hava vist á, at sjálvt ein skipan við føroyskum rakstri av tí føroyska partinum av íslendsku tænastuni krevur góðkenning frá altjóða felagsskapinum ICAO.

Altjóða krøv

Ein fyritreyt fyri at fáa rættin at røkja egið loftrúm er, at landið kann bjóða ein flogvøll, sum lýkur øll altjóða krøv, hvat stødd og trygd viðvíkur.

Sámal Petur í Grund sigur, at Vinnumálastýrið hevur vent sær til Statens Luftfartsvæsen við nøkrum spurningum, og tá fæst at vita, hvørjar treytir skulu lúkast, áðrenn føroyingar kunnu átaka sær ábyrgdina av føroyska loftrúminum, og hvarvið fáa inntøkur burturúr.

Íslendingar hava áður sagt, at gjaldini, sum flogførini rinda fyri at flúgva í loftrúminum kring Føroyar og Ísland, eru einans endurgjald fyri tær útreiðslur, sum standast av ábyrgdini fyri íslendska og føroyska loftrúmið.

Spurningurin er also, um tað yvirhøvur gevur nakað av sær, at yvirtaka ábyrgdina fyri loftrúminum.

Áðrenn landsstýrið hevur fingið svar frá Statens Luftfartsvæsen, vil landsstýrismaðurin heldur ikki svara spurningunum hjá Bjarna Djurholm um, hvørjar inntøkur samfelagið kann fáa av eftirlitinum við loftrúminum, og hvørjar inntøkur annars kundu verða fingnar burtur úr at hava ein 2.200 metrar langan flogvøll.



Tað er ikki bara sum at siga tað, at yvirtaka eftirlitið við loftrúminum í føroyskum øki

Teir fimm lærararnir fingu prógvini handað í Tinganesi seinasta hósdag

Oljan er nú komin inn um skúlagátt

Fimm føroyskir lærarar fingu prógv handað í farnu viku. Lærararnir kunnu nú geva frálæru innan boring og ætlanin er at byrja sum skjótast.
– Um einar 3 vikur skulu vit helst hava fyrsta skeiðið, sigur Claus Reistrup á Landsskúlafyrisitingini.

DIA MIDJORD

Tveir lærarar frá tekniska skúlanum í Klaksvík, ein frá tekniska skúlanum í Havn, ein frá Sjómanaskúlanum og ein frá Maskinmeistaraskúlanum hava nú fingið boriprógv. Í sjey vikur fingu teir frálæru í jarðfræði, logging, borivesku, trýstræði og boritekni. Umframt vóru teir kunnaðir um strongu trygdarkrøvini og vitjaðu eisini á fleiri oljupallum.

Claus Reistrup á Landsskúlafyrisitingini sigur, at teir fimm lærararnir longu hava gjørt eitt útkast til eitt tvey daga skeið.

– Hósdagin hava vit ein fund, har vit ætla at fáa seinastu tingini upp á plass. Og eg rokni við, at vit hava havt fyrsta skeiði um einar triggar vikur, sigur Claus Reistrup.

Skeiðini skulu ætlandi haldast á plássum, har nóg nógv boða frá luttøku.

Claus Reistrup heldur tað vera eitt risastig á rettu leiðini, at vit nú hava útbúgvið okkara egnu fólk til oljuvinnuna. Hann heldur eisini, at tað er gott og sunt, at vit í dag spakuliga kunnu menna okkum sjálvi uttan beinleiðis hjálp frá útlendingum.

– Vit hava í dag ein ávisan kunnleika, sum vit sostatt kunnu arbeiði viðari við og menna, um tiðin gongur, sigur Claus Reistrup.

Og at oljan eisini er komin inn í skúlaverkið, tað ger bara alt nógv meira spennandi, leggur hann aftrat.

Moirae ger um seg í Finnlandi

Eitt sjónvarpslið og trý umboð fyri skrivaðu pressuna í Finnlandi, vóru á konsert við Moirae í Helsingfors leygardagin. Í gjárkvøldið skuldu teir vera við til eina størri konsert í finska høvuðsstaðnum.

GEORG L. PETERSEN

Pressan var væl umboðað á konsertini hjá Moirae í Kabelfabriken í Helsingfors leygardagin. Hetta er ein gamal bygningur til framleiðslu av káplum, sum er gjørdur um til ein mentunardepil í Helsingfors.

Verri var við áskoðarum, sum bert vóru nakrir heilt fáir í tali inni í ómetaligu stóru framleiðsluhøllini. Tiltakið, sum var ein liður í eini norðurlendskari viku í Finnlandi, var illa lýst og nakað frammanundan hevdu líka fáir áskoðarar verið til konsert við einum stórum finskum navni.

Professionellir

Men Moirae gav kortini eina professionella framføroslu, sum hugtók flestu áskoðararnar. Teir lótu seg ikki ávirka av lítlu áskoðarafjøldini í ovurstóru høllini.

– Eg royndi bara at hyggja at nøkrum heilt ungum, sum dansaðu frammanfyri pallin, meðan vit spældu, segði Terji Rasmussen, sangari, beint eftir konsertina, sum vardi í tveir tímar.

Og hann gav alt hann átti henda dagin – dansaði runt á pallinum eins og vit kenna hann her heima. Eisini hinir Moirae mennirnir livdu við.

– Tað kendist tó eitt sindur løgið. Vit høvdu fingið at vita, at eini 2.000 fólk fóru at vera her, segði Kaj Johannesen, trummuslaari.

Samanlagt vóru millum tíggu og fimtan fólk til framførsluna.

Tað var eitt sindur trupult at telja, tí annað virksemi eisini var í stóru høllini. Í hinum endanum hoppaðu børn trambolin og spældu sær á gólvinum sum riddarar við gummisvørum.

Tá smágentur tóku yvirtóku pallin aftaná og við pappgitarum royndu at eftirapa Black Sabbath og Abba, kundu teir fimm úr Moirae ikki annað enn flenna og ristra eitt sindur við høvdinum.

– Hetta er tó nakað av tí mest løgna eg havi verið vitni til, helt onkur teirra fyri.

Men allir vóru glaðir fyri, at pressan í øllum førum hevði fingið boðini, og møtti mannsterk upp.

Finsku føroyingarnir møttu upp

Eisini vóru føroyingarnir í Helsingfors møtti mannsterkir. Tey eru fá sum búgva har.

Tey sum vóru á konsertini vóru Anna-Maria Joensen við danska manninum Ali Celebi, Rúni Brattaberg, sum lesur við Sibelius Akademiet og Annika Jakobsen við finska manni sínum Tapso.

Og tey vóru øll væl nøgd við konsertina og fóru aftaná saman við Moirae út í býin at eta eftir konsertina.

Finska sjónvarpið tekur upp undir konsertini við Moirae leygardagin



Finskir føroyingar og makar til konsert við Moirae. F.v. Anna-Maria Joensen, Ali Celebi (maður Annu-Mariu), Annika Jakobsen og Tapso (maður hennara). Aftanfyri stendur Rúni Brattaberg